# Tørvurin minkaður

**Í sambandi við uppsagnirnar av heimarøktarum í Vágunum, sendi økisleiðarin fyri heimarøktini í øki tvey, Sonja Klein, út eitt tíðindaskriv, har hon millum annað segði, at tað ikki einans er av sparingum, at heimarøktararnir vórðu uppsagdar**

HEIMARØKT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í gjár stóð ein samrøða við Malan Helgudóttir, eftirlitskvinnu og økisskrivara hjá heimarøktini í Vágunum, har hon greiddi frá, at uppsagnirnar eru ein beinleiðis avleiðing av sparingum.

Hesum er leiðarin fyri heimarøktini í øki tvey, Sonja Klein, tó ikki heilt samd í. Við útvarpið mánadagin segði hon, at uppsagnirnar eisini komu av, at tørvurin á heimahjálp er so nógv minkaður.

Sonja Klein segði eisini við útvarpið, at tørvurin á heimahjálp var óvanliga stórur í Vágum til á vári í fjør. Men so er tørvurin minkaður, tí tímatalið hjá brúkarunum er minkað.

Sonja legði so afturat, at hetta og ein nátúrlig frágongd, gjørdu sítt til, at tørvurin minkaði.

Men søgan um Dinnu og foreldur hennara er eitt dømi upp á júst tað øvugta.

Hetta ásannar Sonja Klein. Hon leggur tó dent á, at tað, sum hon segði við útvarpið var útfrá uppsagnunum.

– Eg havi ikki hug at fara meira út í fjølmiðlarnar við hesum sum nú er, so eg havi ikki aðrar viðmerkingar enn tað, sum eg segði við útvarpið mánadagin, sigur Sonja Klein, økisleiðari fyri heimarøktini í Vágunum og Norðstreymoy.



*Dinna Jacobsen passar foreldur síni, Marianna og Poli Johansen, tí sparingar á heimarøktarøkinum í Vágunum gera, at tey ikki kunnu fáa heimarøkt*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Svikin á ellisárum

**Síðani september í fjør hevur Dinna Jacobsen úr Sørvági verið um foreldur síni, sum bæði eru so mikið illa fyri, at teimum tørvar heimarøkt. Men tað letur seg ikki gera, fingu tey at vita, tí ongir pengar eru til taks**

HEIMARØKT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Hjúnini Marianna, 89, og Poli, 83, eru noydd at búgva inni hjá dótrini, Dinnu Jacobsen, tí ongin heimarøkt er at fáa orsakað av sparingum. Tey hava búð inni hjá henni í góðar tríggjar mánaðir nú og hava tað eftir umstøðunum gott. Men Dinna sjálv ivast ikki í, at um foreldrini kundu búð heima, so høvdu tey viljað tað.

Inntil september mánað í fjør arbeiddi Dinna í einum barnagarði í Sørvági. Men so varð mamma hennara løgd undir skurð, og tað hevði við sær, at tørvur varð á heimarøktarhjálp.

Dinna fekk at vita, at tað bar ikki til, og so royndu hon og pápi hennara sum frægast at vera um mammuna.

Men so illa vildi til hjá teimum, at í november løgdust bæði mamman og pápin við lungnabruna. Tey lógu á Landssjúkrahúsinum í tvær vikur har á leið. So vórðu tey útskrivað - mamman fyrst. Og nakrar dagar seinni var pápin eisini útskrivaður. Men bæði vóru tey so mikið illa fyri, at tey ikki megnaðu at røkta vanligar húsarhaldspliktir.

Aftur spurdi Dinna um heimarøkt, men svarið var tað sama. Tey kundu ikki fáa heimahjálp, tí at ongir pengar eru til tað.

## Vónbrot

Dinna sigur, at foreldrini høvdu tað ræðuliga ringt, tá tey komu heim, so Dinna bað um farloyvi frá sínum starvi og tók tey heim til sín at búgva, har tey framvegis eru.

– Tað var eitt stórt vónbrot, at tey ikki kunnu fáa heimarøkt. Tvey so gomul fólk, sum hava tænt samfelagnum í so mong ár ikki kunnu fáa ta hjálp, sum teimum tørvar á ellisárum, er nógv fyri, sigur Dinna, sum er líka við at geva upp í dag.

Hon spyr eisini, hvat hevði hent við foreldrum hennara, um hon ikki var nóg frísk til at taka sær av teimum. Hon er teirra einasta barn, og hava tey sostatt ongan annan.

– Eg spyrji bara, hvar tey so skuldu farið, sigur hon hørm á málinum.

Tað er ymiskt frá dag til degi, hvussu tey bæði gomlu eru fyri. Onkrar dagar gongur heilt væl, men aðrar orka tey nóg illa at koma upp úr seingini, og tískil má onkur vera um tey allatíðina.

Dinna hevur onki ímóti at passa síni foreldur, men hon er hørm og vónbrotin kortini. Tí hon eigur ikki at vera heima, hon hevur eitt starv at passa. Og harafturat so ivast hon ikki í, at um foreldur hennara fingu valið, so høvdu tey heldur viljað verið heima hjá teimum sjálvum við hjálp frá heimarøktini.

## Múrar allastaðni

Dinna tosar eisini um, hvussu torført tað er at fáa hjálpartól og annað. Nógv pappírsarbeiðið av tí, og tað tekur langa tíð, áðrenn nakað svar kemur.

– Ein nýtir eina øgiliga rúgvu av orku fyri at royna at finna teimum ta hjálp, sum er at fáa, men ein rennur seg í múrar allastaðni. Og tá missir man at enda mótið og letur bara standa til, sigur hon.

Í fyrstuni var Dinna óð um, at tey ikki kundu fáa heimarøkt. Og hon heldur tað vera ov galið, at tvey fólk, sum ongantíð hava verið ein byrða fyri samfelagið ikki kunnu fáa heimarøkt. Men síðani hevur hon roynt at bitið tað í seg, men hon dylir ikki fyri, at hon heldur tað vera ov galið.

– Tað er ótrúligt, at tað ikki skal kunna bera til, sigur Dinna.

Foreldur hennara eru munandi betur fyri í dag enn fyri tveimum mánaðum síðani, men tað er ikki hugsingur um hjá teimum at kunna búgva fyri seg sjálvi, tí tey megna ikki at gera mat ella reint.

Nær tey kunnu vænta at fáa heimarøkt, veit Dinna onki um, og sostatt er framtíðin greið í fyrstu atløgu. Tey verða búgvandi hjá Dinnu og manninum, og Dinna verður í farloyvi so longi, sum tørvur er fyri tí.



# Ferðafólkamet í 2003

**Í 2003 setti Vága floghavn met fyri í ferðafólkatalið. Heili 162.917 ferðaðust um flogvøllin í Vágunum í fjør**

FLOGFERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Ongantíð hava fleiri ferðafólk ferðast yvir flogvøllin í Vágunum sum í fjør. 162.917 ferðafólk løgdu í 2003 leiðina yvir Vága floghavn, og tekur hetta talið metið frá 2001. Tá var ferðafólkatalið uppi á 158.056. Ferðafólkatalið í 2002 var 156.895, so vøksturin í fjør var uppá 3,8 prosent.

Upplýst verður av flogvøllinum, at vøksturin stavar serliga frá leiðunum til og frá Stórabretlandi og Íslandi, meðan talið á Danmarkar leiðunum er óbroytt í mun til árið frammanundan.

Í desember mánaði í fjør fóru og komu beint undir 10.000 fólk um flogvøllin í mun til 9396 árið fyri. Hetta er ein øking í desember mánaði á 4,8 prosent.



*Ferðafólkatalið í Vágunum setti met í 2003*
*Savnsmynd*

Fyri 10 árum síðani var ferðafólkatalið niðri á 87.133 fólkum, og hetta talið er vaksið til 162.917 fólk í 2003. Hetta er ein øking, sum svarar til 87 prosent.

Ein lítil afturgongd hevur verið í flogferðsluni tó. Í 2003 komu og fóru 5217 flogfør í mun til 5280 í 2002.

# Sjálvhjálparbólkarnir aftur í gongd

TÍÐINDASKRIV
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í fjør byrjaðu tær tríggjar Anna S. Dalsgaard, Oddvør Poulsen og Jóngerð Poulsen við sjálvhjálparbólkum fyri børn, sum hava mist eitt foreldur.

Tríggir sjálvhjálparbólkar vóru í 2003 við umleið 25 børnum. Arbeiðið hevur gingist so mikið væl, og ætlanin er tí at fara undir nýggjar bólkar í ár. Í fyrsta umfari er talan um børn, sum eru millum 8 og 17 ára gomul. Kanska talan eisini verður um at fáa børn, sum hava mist systkin við seinni.

# Politikkur á Vertshúsinum



*POLITISKT VERTSHÚS: Vertshúsið skipar í døgunum uppundir valið fyri nøkrum politiskum tiltøkum*
*Savnsmynd*

**Vertshúsið verður í hesum valdøgum karmur um nøkur politisk tiltøk**

VERTSHÚSIÐ
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Vertshúsið fer nú undir nøkur politiks tiltøk fram til valið.

Fríggjakvøldið 9. januar verður eitt kvinnupolitiskt kvøld, har kvinnlig valevni úr øllum flokkum fáa høvi at hitta møguligar veljarar. Mannfólk hava onga atgongd hetta kvøldið. Tó verður ein einsamallur hani millum allar hønurnar, og er tað Uni Debes, sum fer at spæla tónleik.

Huxa fer allan januar mánað at hava »Café Huxa« í kjallaranum á Vertshúsinum. Har verður skipað fyri ymsum politiskum kjakfundum og dialogi við politiskan ungdóm. Cocktailurin verður blandaður við góðum tónleiki.

Hóskvøldið 15. januar fer Johan í Kollafirði at hava eitt hip-hopshow undir heitinum »Føroyingar eru lættir at lumpað«. Hetta showið er sensurerað.

Tann 16. januar fer Rói Egholm at hitta sínar mongu vinnulívsveljarar.

Frá Vertshúsinum verður upplýst, at talan møguliga eisini verður um onnur valevni, sum fara at nýta hetta høvið at koma í samband við veljararnar, nú dagarnir fækkast til sjálvan valdagin.

**Frá Sandoyar sýslu Javnaðarfelag**

**Hugnakvøldið**

ið skuldi verða á Sandi 29. november, verður ístaðin leygardagin 10. januar kl. 19.30 á Keldu í Skálavík við røðum, sangi, tónleiki og góðum mati.

Øll javnaðaráhugað eru vælkomin.

**Nevndin**

Runavíkar Kommuna.

**Móttøka**

Í sambandi við at arbeiðsformaður okkara André Hentze gevst eftir 29 ár í starvi hjá Runavíkar kommunu, verður skipað fyri almennari móttøku i byráðssalinum fríggjadagin 9. januar frá kl. 15.00-18.00.

**Runavíkar býráð**